Í felag fyri teg

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 2 | Summarið 2022 | pedagogfelag.fo



## Endiliga ein veruligur aðalfundur aftur

## Námsfrøðin fyrr og nú

## Úbúgving má vera eitt krav

## Um tað mundið meðan jørðin enn ikki var rund...

## Vit ynskja øllum eitt gott summar

FØROYA PEDAGOG FELAG

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent

Upplag
2.200 eintøk

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Annika Østerø
Skrivari
annika@pedagogfelag.fo



Valborg H. Hammer
Nevndarlimur
valborg@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

**4** Álitisfólkini eru álitið – blaðið út til øll

**5** Endiliga ein veruligur aðalfundur aftur

**9** Formaðurin hugleiddi: Vit eru límið í samfelagnum

**14** Úbúgving má vera eitt krav

**17** Føroyska dag-stovnaskipanin á skránni í Athen

**19** Niðurteljing til stóru ráðstevnuna í Sveis

**21** Væl eydnað pioner-tiltak

**22** Pioner-tiltak: Fyrr var tíð til námsfrøði og nærveru

**34** Fakfagnaður: Námsfrøðin fyrr og nú

**35** Um tað mundið meðan jørðin enn ikki var rund...

**39** Skrá fyri fakfagnaðin





ODDAGREIN Jógvan Philbrow, formaður, skrivar

# Limaskapur er sum at ferðast



Skalt tú út at ferðast í summar?

Tá vit skulu út at ferðast, og tað gera nógv um summarið, er gott við einum áminningarseðli. Tú skalt minnast til at hava pass og onnur ferðaskjøl við, at ferðatryggingin er í lagið, og tú skal minnast til at pakka alt viðførið, ið hoyrir til ferðina.

Eg havi her hug at samanbera eina slíka ferð við tín limaskap í einum fakfelag.

Tí skalt tú út at ferðast í arbeiðslívinum, er eisini skilagott at gera sær ein áminningaseðil yvir alt, ið hóskar til ferðina. Og eins týdningarmikið og passið og viðførið er til summarferðina suðureftir, er limaskapurin í fakfelag fyri ferðina á arbeiðsmarknaðinum.

Fakfelagslimaskapur er samhaldsfesti, tað at vera ein partur av einum felagsskapi, sum lyftir í felag, sum stríðist fyri at bøta um lønir og setanarviðurskifti og umstøðurnar annars á arbeiðsplássunum. Kollektiva lønaravtalan er ikki alt, við limaskapinum fylgja eisini tryggingar og skipað eftirlønarviðurskifti – framíhjárættindi hjá tær sum einstaklingi at fáa sum mest burturúr, og hetta eru ágóðar, sum allir limir fáa.

Eisini er felagið brynjað til og til reiðar at hjálpa tær við ráðgeving og vegleiðing og, um illa vil til, við løgfrøðiligari ella aðrari serkønari hjálp, tá brúk er fyri tí.

Limir í Føroya Pedagogfelag fáa eisini møguleikan at vera partur av ymiskum øðrum fakligum felagsskapum.

Men hví tosa um áminningarseðlar í hesum sambandi? Tí limaskapur í fakfelag er ikki longur ein sjálvfylgja á arbeiðsmarknaðinum, og arbeiðsgevarar kappast ikki um at halda eyga við, um tíni viðurskifti í so máta eru í lagi.
Tí henda áminningin um, at neyðugt er hjá øllum at kanna eftir, at limaskapurin er í lagi.

Tað merkir fyri okkara viðkomandi, at limagjald verður flutt til Pedagogfelagið, og at fólk eru skrásett rætt hjá felagnum.

Eins og vit við hesum vilja ynskja øllum eina góða summarferiu, so ynskja vit eisini øllum limunum eina framhaldandi góða og trygga ferð í arbeiðslívinum. Føroya Pedagogfelag ger sítt, men tú sum limur má eisini gera títt at tryggja, at alt er sum tað skal vera á tí ferðini.

Í hesum Pedagogblaðnum, sum er heilar 40 síður, kanst tú lesa um áhugavert tiltak hjá áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum, um seinasta aðalfund hjá Føroya Pedagogfelag – ikki minst um týdningin, sum gestarøðarin, formaðurin í danska Socialpædagogerne, legði í yrkisføri – fakligheit. Umframt hetta eru smátíðindi um eitt nú komandi fakfagnað, sum verður 10. og 11. juni, og um kongressina hjá altjóða sosialpedagogiska felagskapinum AIEJI í Sveis í september.

Góðan lesihug og gott summar.



*Álitisfólkini eru álitið – eisini at tryggja, at allir limir felagsins fram eftir fara at fáa pappírsútgávuna av Pedagogblaðnum. Myndin er frá álitisfólkatiltakinum, sum var í Smæruni í Havn 17. mai*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Álitisfólkini eru álitið – blaðið út til øll

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Síðan Pedagogblaðið varð endurreist, eru flestu útgávurnar prentaðar í avmarkaðari nøgd og bara sendar til stovnar og onnur arbeiðspláss, har limir hjá Føroya Pedagogfelag arbeiða. Bara aðalfundarbløðini hava verið prentað í fullum upplagi og send øllum limunum.

Øll hava tó havt atgongd til webútgávuna av blaðnum, sum altíð er tøk á heimasíðuni.

Nú er ætlanin fram eftir at prenta alla útgávurnar í fullum upplagi, so at allir limir felagsins fáa blaðið hvørja ferð.

Ein avbjóðing í so máta er útberingin. Postútberingin er dýr og dýrkar alsamt. Tað er eisini beinleiðis orsøkin til, at felagið higartil hevur avmarkað prentaða upplagið.

Men nú fer felagið sjálvt at royna at skipa útberingina í samstarvi við øll tey mongu røsku og dugnaligu álitisfólkini kring landið. Tey tilsamans umleið 100 álitisfólkini hjá Føroya Pedagogfelag skulu fram eftir býta bløðini út til limirnir á sínum arbeiðsplássum.

Hetta blaðið er tað fyrsta, har hesin leisturin verður royndur, og vónandi bera limirnir yvir við, at tað í fyrstani kunnu vera ávísar logistiskar og seinkandi forðingar at fáa av vegnum.

# ENDILIGA EIN VERULIGUR AÐALFUNDUR AFTUR

**Eftir tvey ár í undantaksstøðu vegna koronu kundi Føroya Pedagogfelag í mars aftur halda ein vanligan aðalfund, og væl var møtt. Rættiligur spenningur var í nevndarvalinum, tá tað stóð á jøvunum um annan sessin, so valið mátti gerast av við lutakasti**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Væl av fólki var møtt upp til aðalfundin hjá Føroya Pedagogfelag, sum var hildin í Veitsluhøllini á Hotel Føroyum 5. mars.

Kanska ikki so løgið, at limir felagsins vóru svangir eftir at fylkjast í flokki aftur til fakligt kjak, felagsanda og sosiala samveru. Tí hesum hevur onki verið av tvey tey seinastu árin. Undantaksstøða hevur valdað vegna heimsumfatandi koronufarsóttina, og í 2020 bleiv



*Harald Joensen bleiv ov stuttur í lutakastinum, men tað tók hann við reystum ryggi, einum brosi og góðynskjum av røðarastólinum til aðalfundin og felagið*

*Mynd: Bárður Lydersen*




*Nevndarvalið var talgilt, men tað stóð á jøvnum ímillum Gunnvá Akraberg Hansen og Harald Joensen, so avgerðin mátti falla á sjálvum aðalfundinum. Fundarstjórin Mimi Steintórsdóttir, adovkatur, dróg vinnaran úr brævbjálvanum, sum Petur Sigurd Johannesen, grannskoðari, hevði latið lepparnar við nøvnunum í, og Herluf Sørensen, ið varar av talgildu valskipanini, helt eyga við, at alt fór rætt fram. Uttast til vinstru er tað Birita Hammer Jacobsen, umsitingarleiðari í Føroya Pedagogfelag, ið heldur støðuna vera stuttliga*

*Mynd: Bárður Lydersen*



*Fólk vóru íðin at gera viðmerkingar, tá høvi var til tað. Her er tað Rógvi B. Dam, námsfrøðingur, ið hevur orðið*

*Mynd: Bárður Lydersen*

aðalfundurin fyrst útsettur og síðan avlýstur. Í fjør var ein skerdur aðalfundur hildin, har bara álitisfólk vóru til staðar á sjálvum fundinum, men til bar hjá hinum limunum at vera við um internetið.

Nú er farsóttin av, í Føroyum í hvussu er, so aðalfundurin í ár var uttan avmarkingar.



*Gunnvá Akraberg Hansen var takksom fyri sítt hepni í lutakastinum og vissaði um, at hon samvitskufull fór at røkja sín nývunna nevndarsess. Sessurin er tó ikki frammandur fyri hana, tí sum varafólk hevði hon sæti í nevndini, meðan Valborg Heradóttir Hammer var í barnsburðarfarloyvi*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Koronufarsóttin hevur tó havt við sær, at talgildar loysnir eru mentar við rúkandi ferð, og eru vorðin gerandiskostur nakað fyrr, enn tær annars høvdu verið tað. Talgildu amboðini eru í stóran mun komin fyri at verða, og áðrenn nakar kendi orðið Covid-19 var Pedagogfelagið í veruleikanum so smátt longu farið undir at taka tey í nýtslu.

Tí eydnaðist tað eisini rættiliga væl at gera 2021-aðalfundin til ein fullkomnan talgildan aðalfund, tá tað um ta demokratisku prosessina ræður – allar aðalfundaravgerðir og øll valini blivu avgreidd online av limunum.

## Lutakast um nevndarsess

Í ár var aðalfundurin aftur av tí gamla slagnum, men nýggja tøknin er ikki løgd á hillina fyri tað. Til dømis var nevndarvalið avgreitt talgilt áðrenn aðalfundin.



*Loksins bar til aftur at halda ein vanligan aðalfund í Føroya Pedagogfelag, og tað sást aftur á uppmøtingini*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Atkvøðugreiðslan steðgaði á middegi dagin fyri aðalfundin, men sigast má, at tað tók ikki broddin av nøkrum spenningi. Tí úrslitið skuldi ikki almannakunngerast fyrr enn á sjálvum aðalfundinum, og tá kom veruligur spenningur í.

Sessurin hjá Valborg Heradóttir Hammer var upp á val. Hon stillaði upp aftur, og tað sama gjørdi Gunnvá Akraberg Hansen, ið sum varafólk hevði røkt sessin alt skeiðið, meðan Valborg var í barnsburðarfarloyvi. Skeiðið hjá Haraldi Joensen var eisini runnið, og eisini hann stillaði uppaftur.

Sostatt vóru trý valevni til tveir nevndarsessir, og tá atkøvðubýtið varð varpað upp á veggin, var greitt, at Valborg var afturvald við 374 atkvøðum, men tað stóð á jøvnum millum Gunnvá og Harald. Tey fingu bæði 214 atkvøður, og so mátti lutakast gera av, hvør av teimum skuldi í nevndina, og hvør skuldi á innskiftarabeinkin sum varafólk.



*Nevndin lýðir á, meðan formaðurin lýsir gongdina á námsfrøðiøkinum og týdningarmiklar hendingar í farna nevndarárinum*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Endaliga avgerðin var flutt úr talgilda heiminum og inn á sjálvan aðalfundin.

Nøvnini á teimum báðum vórðu skrivað á hvør sín lepa og latin í ein stóran brævbjálva, og so fekk orðstýrarin Mimi Steintórsdóttir, advokatur, litið í hendi við rygginum til at draga vinnaran.

Og vinnarin bleiv Gunnvá Akraberg Hansen, sum tískil er nývald í nevndina, og Harald Joensen er nýtt varafólk.



*Valborg Heradóttir Hammer vann sannførandi sín sess aftur og takkaði fyri álitið*

*Mynd: Bárður Lydersen*




*Harald Joensen fekk eitt harraklemm frá formanninum fyri sítt ídna nevndararbeiði, meðan avloysarin í nevndini, Gunnvá Akraberg Hansen, hyggur at*

*Mynd, Bárður Lydersen*

# Formaðurin hugleiddi:
# Vit eru límið í samfelagnum

**Formliga frágreiðingin hjá nevndini í Føroya Pedagogfelag var prentað í seinasta Pedagogblaðnum og var góðkend av aðalfundinum, men formaðurin Jógvan Philbrow helt sum vanligt eisini sína egnu røðu á aðalfundinum. Røðan kann lesast her:**

Góðu limir, enn einaferð – hjartaliga vælkomin á aðalfund.

Sum undanfarin ár er tað skrivliga frágreiðingin frá nevndini, ið skal góðkennast sambært fundarskránni. Frágreiðingina finna tit í seinasta Pedagogblaðnum á síðunum 24-28.

Eg skal tó leggja nøkur orð afturat tí frágreiðingini.

Men fyrst nøkur hagtøl:

Føroya Pedagogfelag hevur í dag 2.058 limir. Umleið 200 eru eindarleiðarar, leiðarar ella varaleiðarar. Okkurt um 800 limir eru námsfrøðingar, námsfrøðiligir ráðgevarar, verkstaðsassistentar ella námsfrøðiligir stuðlar og líknandi. Og okkurt um 1.000 limir eru hjálparfólk, námshjálparar, pedagogiskir assistentar ella líknandi.

Limaskarin svarar til sløk átta prosent av løntakarafjøldini í Føroyum. Ella sløk fýra prosent av fólkatalinum í Føroyum. Vit eru ikki so fá ella smá.

Virksemið seinastu tíðina hevur verið merkt av óstøðugum umstøðum. Vit megnaðu at halda ein eykaaðalfund fyri hjálparfólkaráðnum og leiðararáðnum í farna ári, men eydnan var ikki við okkum, tá vit skuldu hava eykaaðalfund fyri námsfrøðingaráðið.

Ætlandi verður ein eykaaðalfundur fyri námsfrøðingarnar, nú tað liðið ikki er fult mannað.

## 40 ára stríð og sigrar

Tað er í ár, at vit hava 40 ára føðingardag – tað er kanska tað, sum formansrøðan burdi snúð seg um.

40 ár við Føroya Pedagogfelag, og hvat er vunnið?

Sum Jóan Pauli Joensen, fólkalívsfrøðingur, nevnir í grein í bókini “Hygg! pedagogarnir eru komnir”, so settu foreldrini ofta sítt álit á




*– Vit fingu staðfest okkara illgruna – arbeiðsgevarin ætlaði, við at tvinga okkum út í eitt verkfall, at brúka okkum sum jarnbrot at avtaka verkfalsrættin hjá fakfeløgunum, segði Jógvan Philbrow, formaður, millum annað í síni røðu*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Várharra, tá børnini vóru úr eygsjón. Øll bygdin var barnsins heim og spælipláss við teimum fyrimununum og vansunum, tað hevði við sær. Í dag seta foreldur sítt álit á tykkum námsfrøðingar og hjálparfólk á stovnum kring landið.

Frá tí at foreldur og onnur skuldu savnað pening inn fyri at byrja uppá ein barnagarð og skipa tilboð til børnini, hava vit í dag ansingartrygd, har einhvør kommuna sum ein sjálvfylgja hevur eitt tilboð til børnini, og veitingin er undir dagstovnalógini. Flestu dagrøktarskipanir, sum eru eftir, líkjast eisini dagstovnum í dag.

Á sosialpedagogiska virkisøkinum taka vit tað sum eitt samfelagsligt niðurlag tær ferðirnar, vit sum



samfelag mugu ásanna, at vit ikki megna at skipa eitt nøktandi tilboð til teirra, ið krevja námsføðiliga hjálp at megna gerandisdagin. Har vit fyrr royndu at útflyta okkara borgarar, sum ikki passaðu so væl inn, verður nú í stóran mun roynt at finna rúm í Føroyum og nærumhvørvinum at veita rætta tilboðið. Vit eru tó ikki komin heilt á mál enn.

Tá felagið var stovnað fyri 40 árum síðan, skuldu vit sum stætt berjast fyri at verða sædd sum ein sjálvstøðugur partur og sum ein sjálvfylgja í Føroyska samfelagnum. Men har námsfrøðingarnir fyrr máttu hjúkla um og verja tey fáu størvini, sum vóru, er støðan í dag tann, at vit mugu royna at halda aftur, tí vit hava ikki nóg mikið av fólki – vit kunnu ikki manna øll størvini, ið krevja námsfrøðiligan innsats.

So hvat er vunnið?

Vit umboða ein fjølbroyttan hóp – tey, sum arbeiða við børnum, ungum, fólki við menningartarni, vaksnum, gomlum og teimum, sum eru ein samanseting av øllum hesum.

Vit eru tey á gólvinum sum útinna arbeiðið í gerandisdegnum, tey sum skipa arbeiðið, og tey sum ráðgeva og leiða arbeiðið.

Vit arbeiða við teimum útsettu, við teimum sjúku, teimum veikastu og teimum, sum skulu bera okkum inn í framtíðina.

Vit arbeiða í vøggustovum, barnagørðum, frítíðarskúlum, fólkaskúlum, klubbum, verkstøðum, miðnámsskúlum, eftirskúlum, bústovnum, sambýlum, í heimum saman við avvarðandi og á sjúkrahúsum.

Vit arbeiða saman við teimum, sum hava diagnosur, ella sum kanska “áttu” ella “ikki áttu” at havt diagnosur. Vit arbeiða við vanligum og ikki so vanligum menniskjum.

Vit arbeiða við at menna, læra, vegleiða, ráðgeva og at geva menniskjanum rúm at vera til.



## Í front undir farsóttini

So hvat er vunnið?

Vit eru nú límið, sum fær alt at hanga saman.

Og mín sann um vit ikki hava prógvað hetta fleiri ferðir seinastu tvey árini. Uttan tykkara íkast, tykkara arbeiði og tykkara stríð mólu samfelagshjólini ikki. Á dagstovnaøkinum og skúlaøkinum vóru tit í front, tá farsóttin herjaði millum børnini, og hava flest tykkara eisini skula tolt at verða smittað. Tit fullu tó ikki í fátt, og tykkara partur liggur avgjørt ikki eftir.

Inni á serøkinum hava tit eisini prógvað tykkara virði. Tit, sum hava verið í sóttarhaldi við sjúkum borgarum, tit, sum hava isolerað tykkum í privatlívinum, so at tit ikki vórðu tey, sum bóru smittuna inn til okkara mest viðbreknu borgarar. Takk. Eg eri imponeraður, eg eri stoltur av at kunna standa á odda fyri einum felag, við so nógvum limum við hjartanum á røttum stað.

Vit ætla tí eisini at halda ein 40 ára fakfagnað við tí fyri eyga at varpa ljós á okkara fakøki, soleiðis at vit og onnur kunnu fáa eitt betri innlit í, hvat gongur fyri seg á námsfrøðiliga pallinum. Annika Østerø kemur nærri inn á fakfagnaðin seinni í dag.

## Tvingað í verkfall

Í fjør vóru aftur einar samráðingar, har vit enn einaferið skuldu út í eitt verkfall. Og hesa ferð royndu vit eisini at leggja tað øðrvísi til rættis – fyrst við nøkrum smærri 24 tíma arbeiðssteðgum, har arbeiðsgevarin aftur hesa ferð svaraði við einum verkbanni ímóti limum okkara, hesa ferð teir í fólkaskúlanum. Hetta var eisini beinleiðis orsøkin til, at vit vóru tvingað út í eitt fult verkfall við øllum tí, sum tað viðførir.

Enn einaferð haldi eg, at vit vístu, at Føroya Pedagogfelag er eitt sterkt fakfelag, ið stríðist fyri korunum hjá okkum øllum á námsfrøðiliga starvsøkinum, tað veri seg leiðarar, námsfrøðingar og hjálparfólk.

Vit fingu staðfest okkara illgruna – arbeiðsgevarin ætlaði, við at tvinga okkum út í eitt verkfall, at brúka okkum sum jarnbrot at avtaka verkfalsrættin hjá fakfeløgunum.

Dagin fyri (!), at verkfallið rættuliga byrjaði, var eitt uppskot longu borið

niðan í tingið, sum skuldi geva arbeiðsgevarunum alt valdið í spurninginum um, hvørji undantøk skuldu gevast ella ikki. Hetta góðtóku hini fakfeløgini tó als ikki, og hótt var við víttfevnandi átøkum, um uppskotið bleiv samtykt.

## Samanhald gevur styrki

At samanhald gevur styrki er ikki bert ein tómur pástandur, tí veruleikin er, at vit sum felag í størri mun vera noydd at hugsa í uppaftur størri samstørvum, um vit framhaldandi skulu vænta at sleppa at ávirka heimin og samfelagið rundan um okkum.

Fakfelagssamtarvið, ið vit eru ein partur av, hevur eisini ávirkan, og er tað serliga gjøgnum tað, at vit arbeiða fyri styttri arbeiðviku og við at seta ljós á tað sálarliga arbeiðsumhvørvið. Eg kann nevna, at ein frágreiðing um fyrimunir og vansar við at stytta arbeiðsvikuna niður á 37 tímar var løgd fram í fjør, og vísti kanningin, at har stórt sæð bert eru fyrimunir við at gera tað, og at tað í mesta lagið hevði kostað almennu Føroyum umleið 100 milliónir krónur. Tá eru møguligir fíggjarligir fyrimunir ikki taldir við. Hetta er í andsøgn við leysa pástandin hjá einum nú fyrrverandi landsstýrismanni um, at tað hevði kostað 750 milliónir krónjur at framt hesa broyting.

## Rættindi vard og vunnin

Í umsitingini í felagnum er nógv orka løgd í at vinna einstøkum limum og limabólkum síni rættindi. Vit hava vunnið eitt mál um rættin til yvirtíð, og harvið hava vit fingið staðfest, at limir okkara altíð eiga rættin til yvirtíð, um teir arbeiða meira enn 40 tímar í miðal um vikuna – óansæð hvør biður ella áleggur liminum at arbeiða meira.

Vit hava eisini reist og vunnið fleiri mál um, at limir skulu hava rættan starvsaldur.

Nógv orka er eisini løgd í álitisfólkaskeiðini, sum tó ikki eru fullfíggjað enn. Ætlanin var, at øll álitisfólk skuldu hava verði gjøgnum tey fýra tilrættisløgdu modulini, men vegna koronu náddu vit bert at gjøgnumføra tey trý modulini.

Vit skulu so eisini minna á, at álitisfólkaval eigur at vera nú í mars. Ætlanin er, at tey nýggju álitisfólkini skulu fáa tilboð um álitisfókaskeið, og tey "gomlu" fáa uppfylgjandi skeið.

Í felagnum hyggja vit frameftir. Framtíðin snýr seg mest um at virka fyri, at tit fáa betri umstøður at virka í. Eitt sjónligt felag, eitt felag, ið tekur sær væl av sínum limum og virkar fyri at tryggja teimum góða løn og góðar setanartreytir.

Vit fara at koma inn á, hvørjar ætlanirnar eru fyri framtíðina, tá vit leggja virksemisætlanina fram.

Hetta vóru orðini, eg ætlaði at leggja afturat frágreiðingini í blaðnum – vónandi kunnu tit góðkenna hana.

Eg skal vegna nevndina takka fyri farna árið, og vónandi fáa tit ein framhaldandi góðan aðalfund.

### Benny Andersen, gestarøðari:

# Úbúgving má vera eitt krav

**Tað eru nógvar leiðir at ganga at tryggja góða góðsku á tí sosialnámsfrøðiliga økinum, men tað snýr seg um at geva viðkvomum fólkum møguleika at fáa eitt gott lív, og tí mugu krøv um útbúgving setast á almannaøkinum, segði Benny Andersen, formaður fyri donsku sosialnámsfrøðingarnar, ið var gestarøðari á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Gestarøðari á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag í ár var Benny Andersen, formaður í Socialpædagogerne, sum er fakfelagið hjá teimum donsku sosialnámsfrøðingunum, og forseti í altjóða felagsskapinum fyri sosialnámsfrøðingar, AIEJI, har Jógvan Philbrow er aðalskrivari.

Føroyar eru serstakar námsfrøðiliga sæð, tí vit hava ikki býtt námsfrøðifakið upp bæði fakliga og í útbúgvingarhøpi, sum tey hava aðrastaðni, eitt nú í Danmark. Men har fyri galda neyvt somu fakligu fortreytir á teimum ymisku námsfrøðiligu starvsøkjunum í Føroyum sum í Danmark, legði Benny Andersen millum annað dent á.

Reyði tráðurin í røðuni hjá honum var tað fakliga grundstøðið og innihaldið í arbeiðinum – yrkisførið. Danir kalla tað "faglighed."

## Yrkisføri

Boðskapurin hjá Benny Andersen er eins greiður, og niðurstøðan er einføld: Yrkisførið, tað er ein rættur og góður fakligir grundvøllur, er ein avgjørd fortreyt fyri góðum sosialnámsfrøðiligum arbeiði – og øllum øðrum arbeiði fyri tann skyld – og at røkka tí málinum krevst útbúgving.

– Í Danmark siga vit, at sosialnámsfrøðingar hava eina kjarnuuppgávu á sosialøkinum: At geva viðkvomum menniskjum møguleika fyri eftir egnum vali at fáa eitt virðiligt og innihaldsríkt lív. Tað er ein týdningarmikil uppgáva, ein krevjandi uppgáva, og at loysa hana krevst yrkisføri.

– Til námsfrøðiligt arbeiði krevst




*Benny Andersen, formaður í Socialpædagogerne, sum er fakfelagið hjá donsku sosialnámsfrøðingunum, og forseti í altjóða felagsskapinum fyri sosialnámsfrøðingar, AIEJI, var gestarøðari á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag.*
*– Tað ger ikki tað sama, hvør kemur til arbeiðis og við hvørjari útbúgving, og tað ger ikki tað sama, um tú hevur serútbúgving ella ikki. Sjálvandi skal sjálvmorðshótta unga gentan við etingarólagi hava serkøna hjálp, eins og tað er sjálvsagt, at ikki bara ófaklærd fólk skulu vera um vaksna mannin við menningartarni, segði hann millum annað*

*Mynd: Bárður Lydersen*

námsfrøðiligt yrkisføri. Til sosialnámsfrøðiligt arbeiði krevst sosialnámsfrøðiligt yrkisføri. Til hjálparfólkaarbeiði krevst hjálparfólkayrkisføri. Tað ger ikki tað sama, hvør kemur til arbeiðis og við hvørjari útbúgving, og tað ger ikki tað sama, um tú hevur serútbúgving ella ikki. Sjálvandi skal sjálvmorðshótta unga gentan við etingarólagi hava serkøna hjálp, eins og tað er sjálvsagt, at ikki bara ófaklærd fólk skulu vera um vaksna mannin við menningartarni, segði Benny Andersen.

## Útbúgvingarkrav

Í Føroyum er sosialøkið í námsfrøðiligum høpi at kalla samanfallandi við almannaøkið. Tað er í fyrsta lagi á

stovnunum og skipanunum undir Almannaverkinum, at tað sosialnámsfrøðiliga arbeiðið verður gjørt.

Vit útbúgva tó bara eitt slag av námsfrøðingum í Føroyum, eina allround-útgávu. Benny Andersen viðmerkti ikki beinleiðis føroysku námsfrøðiútbúgvingina ella mátan, hon er bygd upp upp á, men hann legði dent á, at málrættað útbúgving – serútbúgving – er ein fortreyt fyri yrkisføri. Eisini námsfrøðiligum yrkisføri.

– Tað eru nógvar leiðir at ganga at tryggja góðsku, men tað slepst ikki undan, at til tess krevst okkurt. Og í fyrsta lagi krevst tað, at vit tora at siga tað hart, at útbúgvingarkrav skal setast í verk á tí sosiala økinum. Tað tora vit nú í Danmark, og vit stríðast við tí arbeiðinum.

– Vit halda í roynd og veru, at føst krøv skulu setast um yrkisføri, so borgararnir fáa røttu hjálpina. Tí á sosialøkinum verða alt ov nógv sett í starv, sum ikki eru nóg væl ílatin at taka á seg tær fakligu avbjóðingarnar, sum har eru. Tí skal útbúgvingarkrav setast í verk á tí sosiala økinum: Á sosialnámsfrøðiligum arbeiðsplássum skulu starvsfólkini vera sosialnámsfrøðingar. Og tað skal samstundis vera ein fortreyt fyri yvirhøvur at kunna góðkenna og reka tilhaldsstøð og samdøgurtilboð til børn og ung og bústaðartilboð til vaksin, segði Benny Andersen á aðalfundinum.

## Mótbrekka í Føroyum

Okkurt um 40.000 danskir sosialnámsfrøðingar eru limir í Socialpædagogerne, og boðskapurin hjá Benny Andersen er ikki sørt ræðandi sæð úr einum føroyskum sjónarhorni. Tí trotið á útbúnum námsfrøðingum á øllum námsfrøðiligum starvsøkjum er so stórt í Føroyum, at tað í løtuni ikki er hugsingur um at vera bara nær námind av at kunna manna starvsøkini í samsvari við galdandi krøv og mál um útbúgvingar.

Dagstovnaøkið er eitt talandi dømi, har lutfallið ímillum útbúnar námsfrøðingar og hjálparfólk vendir øvugt í mun til ásetingarnar í dagstovnalógini.

Tí verður tað helst ein mótbrekka av teimum drúgvu bara at fáa útbúgvið nóg mikið av námsfrøðingum at nøkta verandi tørv nøkulunda. Og enn drúgvari verður brekkan, um vit fram eftir skulu hava serútbúnar námsfrøðingar til tey ymisku serøkini.

Men kjakið í kjalarvørrinum á røðuni hjá Benny Andersen vísti, at eisini nógvir føroyskir námsfrøðingar høvdu ynskt sær, at námsfrøðin í Føroyum bleiv býtt upp longu í útbúgvingini – eins og í Danmark, har tað er siðvenja at skilja ímillum sosialnámsnámsfrøði, dagstovnanámsfrøði og frítíðar- og skúla námsfrøði. Og har verður eisini gjørdu skilnaður í sjálvari útbúgvingini av hesum trimum sløgunum av námsfrøðingum.

Tó eru danskir dagstovnanámsfrøðingar og frítíðar- og skúlanámsfrøðingar í sama fakfelag, BUPL, meðan sosialnámsfrøðingar hava sítt egna fakfelag, Socialpædagogerne.

Vit fara í einum seinni blað at taka tráðin upp aftur um námsfrøðiútbúgving og útbúgvingarkrøv.

# FØROYSKA DAGSTOVNA-SKIPANIN Á SKRÁNNI Í ATHEN

**Fyri fyrstu ferð er føroyska dagstovnaskipanin umrødd á altjóða ráðstevnu uttan fyri Norðurlond. Framløgan hjá Jógvani Philbrow og Elini N. W. Tausen í Athen vakti ans**



INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað er ikki á hvørjum degi, at ljós verður varpað á føroyskar skipanir og føroyskar loysnir á altjóða pallum. Men hví skuldi tað ikki tað, kundi ein spurt, tí tá tað hendir, vekir tað ofta ans.

Soleiðis var eisini í grikska høvuðsstaðnum Athen síðst í apríl, tá altjóða námsfrøðiliga ráðstevnan "Play on Early Education, Future is better with play" var har.

Sum enska heitið ber boð um, snúði tað sum um spæl á dagstovnum, og at spælið borgar fyri eini betri framtíð hjá børnunum.

Ráðstevnan var í døgunum 27.-30. apríl, og tað var á seinasta degnum, at Jógvan Philbrow og Elin N. W. Tausen høvdu sína framløgu um føroysku dagstovnaskipanina.

## Altjóða áhugi

Heitið á framløguni var "Faroese Pedagogy" (Føroysk námsfrøði).




*Jógvan Philbrow og Elin N. W. Tausen greiddu frá um føroysku dagstovnaskipanina á altjóða ráðstevnu í Athen, og bæði fyriskiparar og áhoyrarar lótu væl at og vóru áhugað í at hoyra meira*

Fyrst greiddi Jógvan frá, hvussu skipanin er uppbygd, innihaldinum í dagstovnalógini, stutt um stevnumið og námsætlanir, og hvussu ein vanligur dagstovnur er samansettur við vøggustovum og barnagarðsstovum. Síðan greiddi Elin frá tí námsfrøðiliga innihaldinum, har álit á barnið og á starvsfólkið er ein grundleggjandi partur av føroysku námsfrøðini.

– Okkum vitandi var hetta fyrstu ferð, at føroyskir námsfrøðingar hava hildið fyrilestur uttan fyri Norðurlond um føroysku dagstovnaskipanina. Fyriskipararnir og áhoyrarar lótu væl at og vóru áhugað í at hoyra meira. Eitt nú varð spurt, um áhugi er fyri at halda ein líknandi fyrilestur á einari online ráðstevnu, sum verður fyriskipað í USA einaferð í framtíðini. Tað vilja vit sjálvandi fegin, greiðir Jógvan Philbrow frá.

Hann leggur dent á, at sjálvt um hann er formaður í Føroya Pedagogfelag, og Elin N. W. Tausen er fyrrverandi næstforkvinna í felagnum, so var tað ikki í teimum leiklutunum, men sum umboðandi bara seg sjálv og føroysku námsfrøðina, at tey vóru við á altjóða ráðstevnuni í Athen.

# Niðurteljing til stóru ráðstevnuna í Sveis

**Tíðin sum partur av námsfrøðiliga arbeiðnum verður í brennideplinum á altjóða sosialnámsfrøðiligu ráðstevnuni, sum verður í Sveis í september í sambandi við aðalfundin hjá AIEJI**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað skuldu verið hampulig sannlíkindi fyri, at fleiri føroyskir námsfrøðingar leita sær til Lausanne í Sveis tíðliga í heyst, tá altjóða felagsskapurin fyri sosialnámsfrøðingar AIEJI hevur aðalfund og stóra ráðstevnu har. Tað verður í døgunum 6.-9. september.

Í hvussu er høvdu bæði forsetin og aðalskrivarin í AIEJI høvi at marknaðarføra stóra tiltakið á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag í mars.

Aðalskrivari í AIEJI er nevniliga sjálvur Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, og forseti er Benny Andersen, formaður í Socialpædagogerne, sum er fakfelagið hjá teimum 40.000 donsku sosialnámsfrøðingunum. Benny Andersen var eisini á aðalfundinum hjá Pedagogfelagnum, har hann var gestarøðari.

Heitið á stóru AIEJI-ráðstevnuni er "Temporality in Educational Action", ið merkir okkurt sum "Tíðin sum partur av námsfrøðiligum virksemi" ella "Bráfeingi í námsfrøðiligum atgerðum".

– Øll sum hava áhuga fyri sosialnámsfrøði kunnu tekna seg. Sum býur hevur Lausanne hollar royndir við sínum sosialnámsfrøðiliga arbeiði til frama fyri børn og ung í vandabólkum. Har verður nógv at læra og nógvur íblástur at heinta, og tí vóni eg, at eisini føroyskir námsfrøðingar fara at sýna ráðstevnuni áhuga, sigur Jógvan Philbrow.

## Benny rósti Jógvani

Í síni gestarøðu á aðalfundinum hjá Pedagogfelagnum rósti Benny Andersen føroyska pedagogfelagsformanninum fyri hansara góða íkast sum aðalskrivari í AIEJI – serliga við tí í huga, at sosialnámsfrøði ikki hevur formliga tign sum eitt sjálvstøðugt námsfrøðiligt yrki í Føroyum.

Í endanum á røðu síni fekk Benny Andersen fundarfólkið at rópa í kór "Vit hava heimsins besta starv" – við hesum vann hann eitt veddimál við ein landsmann um, at tað bar til at fáa føroyingar upp frá, segði hann – og vísti síðan á stóra týdningin, ið sosialnámsfrøðin hevur í øllum samfeløgum, sum vilja taka hond um sínar veikastu borgarar.




*Benny Andersen, formaður í danska Socialpædagogerne og forseti í AIEJI, og Jógvan Philbrow, aðalskrivari í felagsskapinum, vóna, at eisini føroyskir námsfrøðingar fara at sýna áhuga fyri aðalfundinum og stóru ráðstevnuni tíðliga í heyst. Á myndini skjalprógvar Benny Andersen við videoupptøku á telefonini, at hann hevur vunnið eitt veddimál: At tað bar til at fáa føroyingar upp frá, og at hann kundi fáa allar luttakararnar á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag til í kór at rópa "vit hava heimsins besta starv"*

*Mynd: Bárður Lydersen*

– Hóast tit í Føroyum hava karmar og kor, sum eru ymisk frá okkara í Danmark, so er tað nógv, vit kunnu læra hvør av øðrum. Tað er eisini orsøkin til, at vit báðir eru í AIEJI, segði hann og peikaði á Jógvan Philbrow.

- Í AIEJI virka vit fyri at styrjka og menna tað sosialnámsfrøðiliga fakið og skapa ein felags fakligan samleika tvørtur um landamørk. Og felagsskapurin er í veruleikanum tann einasti í heiminum, har sosialnámsfrøði sum fak og yrki er í breinnideplinum. Felagsskapurin varð stovnaður eftir Seinna Heimsbardaga, tá nógv lond stríddust við svárar sosialar trupulleikar, og tað tí var ein sjálvfylgja, at londini býttu royndir. Tað gera vit enn. Tað liggur ein risastór læring í tí, sosialnámsfrøðingar gera í øðrum londum, sum kann brúkast í dagliga arbeiðnum á teimum einstøku bútilboðunum ella tilhaldsstøðunum í Danmark. Tí tørvirnir hjá borgarunum eru grundleggjandi teir somu.

– Eg vóni avgjørt eisini at síggja nógv av tykkum, tá vit halda heimsráðstevnuna í Lausanne í Sveis í september. Har fara nøkur av fremstu fakfólkunum í heiminum at hava framløgur, har verður vitjað á lokalum arbeiðsplássum, og har verða verkstovur, har sosialnámsfrøðilig fakfólk sjálv sýna fram yrkisførið, tey hvønn dag brúka í sínum arbeiði, segði Benny Andersen.

Meira fæst at vita um AIEJI, aðalfundin og ráðstevnuna á hesum leinki: https://aieji2022.ch/en/

# VÆL EYDNAÐ PIONER-TILTAK

**Umleið 60 námsfrøðingar møttu upp til limatiltak hjá áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum, har ferðast var aftur til ta fyrstu tíðina hjá námsfrøðiyrkinum í Føroyum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Fundarhølið á Hotel Brandan í Havn var fullsett, og tað bleiv eitt stak hugnaligt og lærurikt kvøld, tá áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum skipaði fyri limatiltaki 4. mai.

Evnið var tann allar fyrsta tíðin hjá námsfrøðini sum yrkisfak í Føroyum, og hvussu arbeiðið og gerandisdagurin var hjá teimum fyrstu námsfrøðingunum – pionerunum.

Føroyska námsfrøðiútbúgvingin kom ikki fyrr enn í 1986, men áðrenn tað fóru føroyingar serliga til Danmarkar at nema sær útbúgvingina, onkur í 1970'unum, og tíðliga í 1980'unum kom ferð á.

Tilgongdin til hetta limatiltakið hevur verið drúgv, tí neyðugt hevur verið at útsett tað tvær ferðir vegna koronufarsóttina.

Ætlanin var, at fleiri av pionerunum skuldu hugleiða, men tað hevur gingið eitt sindur striltið at fáa tilkomnu námsfrøðingarnar at standa fram, sigur Edda Hjartvardsdóttir, forkvinna í áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði. Men Emily Næs vildi, og hennara søga er ógvuliga væl umboðandi fyri ta tíðina.

Og hennara hugleiðingar og ferð í egnum minnum kyndi eisini av álvara undir hugarenslið hjá áhoyrarunum. Løtan, ið var sett av aftaná uppleggið hjá Emily Næs til viðmerkingar og spurningar, bleiv tískil long, so tiltakið fór væl út um ætlaðu tíðina.

– Tað gjørdi í hvussu er onki, og vit halda, at hetta limatiltakið var sera væl eydnað. Tað var ein fragd at hoyra Emily greiða frá og stuttligt at hoyra allar tær søgurnar og hugsanirnar, sum tað fekk fram hjá hinum, sigur Edda Hjartvardsdóttir.

## Ingilín inn fyri Almu

Áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum hevur júst havt aðalfund.

Alma á Lava bar seg undan afturvali til nevndina, meðan restin tók við afturvali. Fyri Almu varð Ingilín Berg vald í nevndina.

Nevndin sær nú soleiðis út: Edda Hjartvardsdóttir, Elin Norðberg Wenningsted Tausen, Jóna Guttesen, Ingerð Andreasen og Ingilín Berg.



*Edda Hjartvardsdóttir, forkvinna í áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum, beyð vælkomin og greiddi eitt sindur frá virkseminum hjá áhugabólkinum*

Mynd: Ingolf S. Olsen



*Hugleiðingarnar hjá Emily Næs vóru mettaðar av bæði skemti og álvara. Hon greiddi eitt nú frá, tá hon á sinni troppaði upp í Danmark í lilla blæu at lesa námsfrøði, og hon harmaðist, at støðan á dagstovnunum í dag er so nógv merkt av strongd*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Emily Næs:
# FYRR VAR TÍÐ TIL NÁMSFRØÐI OG NÆRVERU

**Reyði tráðurin í hugleiðingunum hjá Emily Næs og í orðaskiftunum aftaná hennara frásøgn var, at tað krevst tíð at inna góða dagstovnanámsfrøði í verki, at tað krevst tíð at vera nærverandi og í núinum saman við børnunum. Men tann tíðin er ikki longur**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað var ein bæði stuttlig og lærurík løta hjá teimum umleið 60 dagstovnanámsfrøðingunum, sum mikukvøldið 4. mai høvdu leitað sær á Hotel Brandan í Havn til sonevnda pionertiltakið hjá áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum, har Emily Næs, námsfrøðingur í Lonunum í Hoydølum, legði fyri við at hugleiða um síni skjótt 40 ár sum námsfrøðingur.

Og tað var eisini ein sorgblíð løta, tí tað, sum eftir stóð, var í stóran mun, at sjálvt um námsfrøðingar enn halda námsfrøðina vera heimsins besta fak, so er tað vorðið støðugt torførari ígjøgnum árini at fremja góða námsfrøði í verki. Tí uppgávurnar bara økjast, starvsfólkini gerast færri, og arbeiðið á dagstovnunum í ov stóran mun er vorðið ein kapprenning við tíðina.

Tað gongur sjálvsagt út yvir tað, sum Emily Næs legði dent á var so týdningarmikið í námsfrøðini, nevniliga at vera nærverandi og í núinum saman við børnunum.

### Til Danmarkar í lilla blæu

Men hon byrjaði hugleiðingarnar við skemtingarsamt at vátta onkrar fordómar um námsfrøðingar – serliga frá tíðini, tá fakið var ungt – og ímyndina, sum hon sjálv hevði av teimum donsku námsfrøðingunum í 1970'unum og 1980'unum.

– Hjá mær gekk tað fyri seg upp á tann mátan, at eg hevði gjørt av, at eg skuldi til Danmarkar at lesa og skuldi fyrireika meg til tað. Eg vaks upp í eini tíð, har námsfrøðingar høvdu orð á sær fyri kanska at uppføra seg upp á ein bestemtan máta og lata set í upp á ein bestemtan máta.

– Eg hugsaði, og hevði eisini sæð og



speglað mær í, hvussu námsfrøðingar niðri sóðu út. Altso hvat gingu tey í, vóru tey fín – hvat skuldi eg keypa, áðrenn eg fór niður. So hugsaði eg,  nei veist tú hvat, eg geri akkurát soleiðis, sum eg havi sæð, og ímyndaði mær, at tað var púra kul, sum eg gjørdi.

– So eg fór í Sjómanshandilin og keypti mær eina kakifarvaða mannfólkaskjúrtu. Síðan keypti eg mær einar smekkubuksur í Joto og fekk mammu at geva mær eina hvíta – óbrúkta – blæu, og so fór eg til Andreasen, sum tá var yvir av Apotekinum, og keypti mær kapslar við lillafarvaðari liting. Og eg keypti mær einar kappatuflur niðri hjá Jóan Jakku og ein leðurryggsekk frá Mariu Poulsen. Nú helt eg meg vera ordiliga klára, og so fór eg heim og fekk størstu grýtuna, sum mamma mín átti, og eg tjummaði alt niður í har við hesum kapslunum, tí tað skuldi vera lillafarvað.

– Soleiðis fór eg avstað og kom til Danmarkar í hesum her lillafarvaðu klæðunum, soleiðis at eg hoyrdi til, greiddi Emily frá til látur og stuttleika hjá áhoyrarunum.

## Stóru fyrimyndirnar

Áhugin fyri námsfrøðini var tó ikki komin úr ongum, og hon helt seg alla tíðina til reyða tráðin – at til tess at fremja góða dagstovnanámsfrøði í verki krevst í fyrsta lagi tíð at vera nærverandi og í núinum saman við børnunum

Hvat tað vil siga at vera nærverandi og hava tíð, lýsti hon eina best við at greiða frá, hvaðani hennara lívslangi áhugi fyri námsfrøði og at vera saman við børnum stavar – nevniliga frá egnum uppvøkstri, har mamman og omman hvønn dag, allan sólarringin, sýndu námsfrøði í verki, langt áðrenn orðini námsfrøði ella pedagogikkur vóru til á føroyskum máli.

– Áhugin hjá mær fyri námsfrøðini var kveiktur longu í mínum fyrstu liviárum. Fyrimyndir í uppvøkstrinum skaptu ein stóran áhuga í mær, barninum, sum snúningspunkt í mínum gerandisdegi.

– Eg hevði eina ommu og eina mammu, sum høvdu íbornar gávur at savna børn rundan um seg. Børnini vóru aldrin ein forðing í



*Umleið 60 námsfrøðingar høvdu leitað sær til limatiltakið, og hugleiðingarnar hjá Emely Næs settu av álvara ferð á minnini, so orðaskiftið fór væl út um ásettu tíðina. Hetta kundu fyrireikararnir bara fegnast um*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

teirra lívi. Tær báðar – nú lýsi eg mammu mína og ommu mína, tí tær vóru rættiliga identiskar – hildu aldrin, at børn vóru ein forðing. Tær funnu altíð stuttligar loysnir, um tær eina løtu skuldu takast við okkurt, sum børnini ikki skuldu vera við í. Tað kundi vera ein posi av klemmum, tað kundi vera tann niðasta skuffan í køkinum við øllum handa slag av sleivum og annað. Stólar vóru ongin forðing, um tú vildi byggja tær tína egnu smáttu, tómar dósir av ymiskum slag, alt varð funnið fram, tí at børnini skuldu hava tað gott, meðan mamma tókst við okkurt, sum børnini kanska ikki júst tá skuldu vera uppií.

– Soleiðis kendu vit tað. Tær kundu lættliga fáa okkum at kenna okkum væl og týdningarmikil við tí lætta lyndinum, sum tær eisini høvdu. Mitt í øllum rokanum við klæðum og matgerð, góvu tær sær tíð at seta seg niður at spæla ymisk spøl saman við okkum. Eg minnist spølini, sum eg havi lært, tá eg var lítil. Sovorðið sum at goyma klemmu, tað gjørdu vit so seint sum í gjár uppi í tí barnagarðinum, sum eg arbeiði í nú, og børnini hildu tað vera mikið stuttligt at kalla tað fyri fiskar og

*Emily um síni fyrstu arbeiðspláss: - Ein kendi seg væl og virðismettan, tann sosiali parturin fylti eisini nógv við góðum veitslum og stuttleika. Tí tað skapar samanhald og økir hugin at geva íkast júst á sínum arbeiðsplássi*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



fuglar og goyma her uppi og har niðri.

– Og tær dugdu at læra okkum allar føroyskar ramsur, sum eg dugi ordiliga væl enn í dag, eg hevði helst ikki dugað tær, um tær ikki høvdu lært meg tær so væl. Og so lærdu tær okkum orðaspøl, til dømis hatta, har tú skalt royna ikki at siga ja og ikki siga nei. Og tær komu út í tún at hoppa band, og tær vundu, og har kom alt grannalagið uppí. Soleiðis minnist eg tað, og soleiðis var tað, og tað var stuttligt, greiddi Emily frá.

## Onki æt námsfrøði

Tá var námsfrøði og uppaling ein samanrunnin partur av gerandisdegnum hjá øllum. Bygdir og grannaløg vóru barnagarðar, og øll tey vaksnu har vóru námsfrøðingar. Soleiðis æt tað ikki, men soleiðis var tað.

Men tá Emily var blaðung, var námsfrøðin vorðin eitt fak og ein yrkisleið. Eitt fak, sum var rættiliga nýtt í Føroyum, men hevði nøkur ár á baki aðrastaðni, eitt nú í Danmark.

– Tá tú skalt velja tína lívsleið, vísir tað seg ofta, at tú fært kveikt okkurt í tær, sum gevur tær áræði og hug til okkurt ávíst. Mamma mín plagdi tó at siga, at ikki altíð visti hon, hvussu hon skuldi orða seg tá, hvat dóttir hennara var farin at gera niðri í Danmark, hvat hon var farin at lesa. Konurnar í bygdini, bygdakvinnurnar, søgdu, tá hon fortaldi tað, at var tað nú neyðugt, altso, hetta høvdu tær gjørt alt sítt lív uttan hvørki útbúgving ella løn. Tað var svarið, hon fekk.

– Eg veit ikki, hvussu hon hevur svarað, men errin var hon, tá eg var liðug at lesa, og hon kom saman við pápa mínum og lítlusystrini til Danmarkar at hátíðarhalda meg, greiddi Emily Næs brosandi frá.

Hon er fødd og uppvaksin á Strondum og visti bara um ein bygdafelaga, sum læs til námsfrøðing um somu tíð sum hon.

Tá Føroyar fingu sína námsfrøðiútbúgving í 1986, var tað ein heildarútbúgving, sum tá eins og í dag ikki skilti ímillum ymisku námsfrøðiligu yrkisøkini. Tað gjørdu donsku námsfrøðiútbúgvingarnar og gera tað enn.

Emily Næs er útbúgvin frítíðarnámsfrøðingur. Eftir at forskúlarnir eru vorðnir reglan í Danmark er heitið ofta frítíðar- og skúlanámsfrøðingar. Eisini ber til at lesa til dagstovnanámsfrøðing og sosialnámsfrøðing á donskum útbúgvingarstovnum – pedagogseminarium.

Hon byrjaði at lesa í Esbjerg í 1981, men flutti síðan til Århus, har unnustin, Uni Næs, las gudfrøði. Tey blivu síðan gift, eiga fýra børn, og hann er í dag Føroya dómpróstur.

Emily bleiv liðug við sína útbúgving í 1984.

– Eg fór á frítíðarpedagogseminariið, tí eg hevði altíð havt áhuga í teimum eldru børnunum í barnagarðinum, segði Emily.

## Fyrsti førningurin

Hennara fyrsta arbeiðspláss, tá hon kom heim aftur til Føroya sum útbúgvin námsfrøðingur, var í Dagstovninum í Hoyvík, og hon legði í sínum hugleiðingum stóran dent á

týdningin, sum tann fyrsti førningurin hevur fyri ein ungan, nýútbúnan námsfrøðing. Og í Dagstovninum í Hoyvík høvdu námsfrøðingarnir tíð at vera um børnini – tíð at vera.

– Katrin Petersen sála var leiðari á Dagstovninum í Hoyvík, og har var gott at byrja. Byrjanin aftaná loknan lestur hevur avgjørt stóran týdning fyri tann, sum kemur út. Hvussu verður tú møtt, hvat fyri uppgávur verður tú koyrd út í, hvussu dugir leiðarin at meta um tínar førleikar – og hvussu nógv skal hon leggja á teg. Og so víðari. Hetta dugdi Katrin alt til fulnar, og hon er mikið saknað.

– Alt var nýtt og spennandi har. Tað kendist so stimbrandi at møta námsfrøðingum, sum av øllum alvi brendu fyri at geva børnunum ein virknan og innihaldsríkan dag. Vit gjørdu nógvar túrar. Vit gjørdu túrar oman á Boðanes við glúpum og við spannum, og tað var langur teinur. Eg var tá stuðul hjá einum barni við breki, og vit kundu fara við, og tað kundui taka tímar hjá okkum at koma heimaftur. Vit máttu gera okkum eyka út, tí tað tók longri tíð hjá okkum at ganga. Vit máttu hava ein dupultan matpakka, tí vit settu okkum minst seks ferðir niður, ella kanska tíggju ferðir, at hugna okkum, áðrenn vit vóru heima aftur. Men gott var tað.

– Vit kundu fara niðan í hagan, sum tá var óbygdur beint oman fyri Hoyvíkina. Og har var lætt at fara niðan í hagan og leypa stein av steini og njóta fuglalívið. Eg minnist við undran á, hvussu Hanna Jacobsen, sum tá starvaðist saman við mær, umskapti alrúmið, vit høvdu, til eina listastovu. Hon málaði, kveikti hug og sansir, og onkuntíð var tað so kvirt inni og hugfarsligt at hyggja inn og síggja, hvussu børnini nutu hesa løtuna, og hon kundi eisini finna upp á at leggja klassiskan tónleik á, og hon vildi ikki, at vit órógvaðu ov nógv. Men vit kundu ikki lata vera, vit sum ikki vóru uppií, at stilla okkum uttan fyri vindeygað beint inn til alrúmið, og hyggja, hvussu deiligt tað sá út. Og tað kom nógv spennandi burtur úr, mintist Emily.

## Orka og felagskensla

Emily Næs legði tó áherðslu á, at Hanna Jacobsen sum ein góður námsfrøðingur bert kundi gera hetta, tí hon slapp at nýta síni evni til fulnar.

– Tað er her, eg komi inn á, hvussu týdningarmikið tað er at finna ta serstøku orkuna, sum hvør einstakur hevur, sum kemur út sum nýggjur námsfrøðingur og ikki verður køvdur í ov nógvum sovorðnum, sum øll sjálvandi eisini skulu og mugu duga og gera.

– Øll duga okkurt, øll duga ikki alt. Og tað er tað sama við námsfrøðingum, sum koma út, vit hava so øgiliga ymiskar førleikar. Og her dugdu vit øll saman, haldi eg. Eg minnist tað eisini sum nakað serligt fyri ta tíðina, at námsfrøðingar, sum arbeiddu saman á einum stað, tosaðu eitt vit-mál. Har haldi eg, at nútíðin í stóran mun er farin at tosa ov nógv um, hvat eg og eg og eg vil. Knappliga stendur tú so einsamøll í at skula duga og megna.

– Í tí tíðini, sum eg upplivdi tá, tá eg byrjaði, føldi eg eina felagskenslu, sum eg faktiskt viðhvørt kann hava mist onkunstaðni, greiddi Emily Næs frá.

## Gerandisløturnar

Hon vissaði tó um, at hon ikki vildi látast at vita best um alt, um hvat er verri ella betri, ella at alt var betri fyrr – tí tað var tað ikki.

– Men í dag havi eg loyvt mær at eftirhugsa og reflektera, og so kunnu vit kjakast um tað aftaná, tí eg havi fingið loyvi til bara at oysa út alt tað, sum er mínar royndir, segði Emily.

– Tað festi seg eisini í mítt sinni, hvussu nærverandi og dugnaligir námsfrøðingarnir og hjálparfólkini vóru. Tað var ein friður yvir uppgávunum; tað hevði virði at geva sær tíð til úr- og ílating, tá børnini skuldu út í ein strævnan dag, har tey veruliga fóru til arbeiðis uttandura í øllum veðri. Tað hevði virði at seta seg í sandkassan við teimum minstu og vera í núinum saman við teimum. Tað hevði virði at fara út við børnunum, niðan í køkin og fylgja við, hvussu Jórun, og áðrenn hana Birna, stákaðist við matin, sum tey skuldu eta. Og innrættingin var eisini hugsað inn, soleiðis at tá børnini stóðu í køkinum og skuldu hjálpa Jórun at baka bollar ella sleppa at vera uppií, so stóðu tey í røttu hæddini, uttan at skula fara upp á okkurt at standa. Væl hugsað, genialt. Og har vóru nógvar, nógvar løtur hjá børnunum uppi í køkinum saman við Jórun og Birnu.

– Og so ikki at gloyma Per, sum var okkara fasti pedellur. Hann hevði eitt frímerki av einum verkstað, men hvat, ið ikki kundi ganga fyri seg inni í verkstaðnum hjá Peri, tað er ikki vert at snakka um. Hann hevði øll børnini rennandi aftaná sær, hann var ein partur av okkara starvsfólkatoymi, og tað er nógv saknað í dag, har pedellarnir mugu tuska runt úr einum stovni til ein annan. Teir hava ikki orku til annað, tí teir skulu vera alla møguliga staðni. Vit høvdu ein pedell, sum børnini kendu upp á fornavn, og tey vóru við, tá hann spulaði vindeygu, og tey vóru við, tá hann gjørdi alt fyrifallandi arbeiði úti í garðinum. Per var maðurin í húsinum uppi í Hoyvík, og hatta kann eg gott sakna eitt sindur í nútíðini.

– Allar hesar gerandisløturnar eru fyltar av innihaldi og virðing fyri tí, sum skuldi gerast, og hetta var lærdómurin, sum skuldi geva børnunum sjálvbjargni og mennast í einum tryggum umhvørvi, segði Emely.

Hon greiddi frá, at tá hon í nítiárunum og inn í 2000 arbeiddi í barnagarðinum hjá nonnunum, vóru arbeiðsumstøðurnar og umhvørvið har, júst sum á Dagstovninum í Hoyvík.

– Har upplivdi eg akkurát sama ágrýtni og felagsskap um námsfrøðiligu uppgávurnar; hugsavnan, skapanargleði, forvitni, stóran alsk til starvið, man var settur í. Tað eyðkendi báðar leiðararnar á hesum støðunum, at teir vóru góðir við síni starvsfólk. Ein kendi seg væl og virðismettan, tann sosiali parturin fylti eisini nógv við góðum veitslum og stuttleika. Tí tað skapar samanhald og økir hugin at geva íkast júst á sínum arbeiðsplássi. Gloymið ikki tað, segði Emily.

## Børn skulu sleppa at spæla

Tó at hon bara hevur gott at bera øllum sínum arbeiðsplássum, so er keðiliga sannroyndin, at ferðin er vorðin alsamt størri og tíðin minni.

Og við tíðini er kanska í so nógv nýtt innihald eisini potað inn í námsfrøðiliga arbeiðið. Emily minti tó á, at kjarnin enn er tann sami og gleddist um, at filmurin Sólareygu nýliga aftur er komin til heiður og æru.

Og so endurgav hon eitt brot í Fjarðarok – sum hon sjálv saman við øðrum var við til at leggja lunnar undir, og sum seinni bleiv til Pedagogblaðið – frá 5. desember 1990, har hennara góða vinkona Turið Joensen dróg saman um, hvat dagstovnanámsfrøði eigur at snúgva seg um:

"Endamálini í barnagarðinum snúgva seg um felagsskap, virðing fyri øðrum og leggja dent á spælið hjá børnunum. Børnini skulu hava frið at spæla."

Emily tók eisini fram hugleiðing, sum Hildur Patursson, fyrrverandi forkvinna í Føroya Pedagogfelag, hevði í Fjarðaroki 3. juli 1990 um barnalyndið og menning og læring í námsfrøðiliga arbeiðnum.

Hildur tók ein túr í fjørðuna við børnunum sum dømi:

"Um fjørðuferðin bert hevur tað endamál at læra børnini um fliður og kræklingar, tara, annað livandi ella um bólkingina av fjørðuni, so blívur tað ov fátækt. Eisini í fjørðuferðini mugu vit stimbra øll hundrað málini. At hoppa og ganga í grýtutari fjørðu, liva seg inn í stevið í aldunum, at syngja saman við aldunum, taka tað dragandi í aldunum við. Og so er tað gummiskógvurin, sum vit finna, hann er ikki bert órudd, vit kunnu ferðast saman við gummiskónum, hann kann siga okkum



spennandi søgur úr fremmandum londum. Í eini slíkari fjørðuferð, har nakað er fyri allar sansir, har sum nógv hendir, har sum nógv verður stimbrað, har hevur eisini móðurmálið góð líkindi. Eitt er púra vist, fleiri mál, vit nýta, fleiri mátar, vit úttrykkja okkum upp á, betur verða vit før fyri at skilja kenslur okkara, betur verða vit før fyri at skilja, hvat rørir seg í okkum og í teimum, sum vit eru saman við í okkara dagliga



*Nógv varð flent, tá pionerarnir mintust aftur á farnar dagar*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

lívi. Tað vil siga menna okkara sosiala medvit, og størri verður møguleikin fyri, at innari og ytri veruleikin koma at samskifta við hvørt annað."

Emily Næs endurgav eisini gávumilt nógv onnur fólk – námsfrøðingar, foreldur og onnur – sum hava kveikt og givið henni íblástur á hennara námsfrøðiligu lívsleið.

Álavarsamar rembingar hava einsini verið í føroyska samfelagnum hesa tíðina, serliga fyrst í 1990'unum. Tær sviðu eisini á dagstovnaøkinum, har spart varð inn á bein, og tað var á so mangan hátt strævið at vera námsfrøðingur tá.

Men Emily vísti samstundis á, at tað skal takast í stórum álvara, hvussu slíkar rembingar eisini ávirka sjálv børnini, og her endurgav hon Onnu Debes Hentze, sálarfrøðing – eisini

úr grein í Fjarðaroki, har hon millum annað sá fyri sær, at børnini í 1990'unum ikki fóru at uppliva somu tryggu karmar at vaksa upp í, sum børnini í 1980'unum høvdu.

Men troystin hjá sálarfrøðinginum var, at børn klára tað mesta, um tey verða fyrireikað:

"Tað torførasta at liva í hjá børnum er óvissa, men børn klára at laga seg til tað allar mesta, men tey skulu bara vita, hvat tey skulu laga seg til", skrivaði Anna Debes Hentze.

## Strongd var ikki til

Eitt tað mest brúkta orðið í nýggjari tíð, tá um arbeiði og arbeiðsumstøður ræður, er strongd. Ikki minni á dagstovnunum og øðrum námsfrøðiligum arbeiðsplássum. Tað er ein broyting, sum serliga hevur tikið dik á seg tey seinnu árini, men tað er eitt fyribrigdi, sum var ókent, tey fyrstu árini, Emily starvaðist sum námsfrøðingur..

– Eg starvist nú á mínum 38. ári sum námsfrøðingur á dagstovnaøkinum. Arbeiðsgleðin er heilt vist til staðar, hóast ein ikki gerst skjótari í vendingini við árunum. Eg havi lært um nútíðina, at um samsvar skal vera ímillum tað, sum eg megni at gera, og krøvini til tað, sum eg verði áløgd at gera – um tey ikki standa mát við orkuna, annaðhvørt á stovninum ella mína egnu orku – ja so er tað ikki samanhangur í nøkrum. Tí tað er tá, at vit í nútímans máli tosa um eitt, ið eitur strongd. Tað er eitt orð, sum slett ikki var uppfunnið, tá eg bleiv pedagogur. Tað var kanska onkustaðni har úti á onkrum øðrum arbeiðsplássum, men eg kendist ikki við tað.

– Tá man var móður, so hvíldi man seg, ella fór kanska eitt lítið sindur niður í arbeiðstíð, ella fekk sær kanska eina lættari uppgávu í eina tíð. Altso, eg minnist ikki orðið strongd, men nú brúka vit tíð upp á tað, og tað skulu vit brúka tíð upp á. Tí úti á arbeiðsplássunum er tað týdningarmikið at steðga á, anda djúpt og finna ró í nærveruni, í tí smáa og í tí týdningarmikla, og ásanna at ambisjónirnar viðhvørt mugu skrúvast niður. Tá vit vita, at orka og kapasitetur ikki røkka til at fáa alla námsfrøðina inn á stovnin, so kann ambisjónsstigið hjá okkum ikki vera líka høgt, sum tá vit hava fult av starvsfólkum, bæði útbúnar námsfrøðingar og hjálparfólk.

– Tá má okkurt skrúvast niður, og vit skulu fokusera upp á tað, sum hevur eins stóran týdning og høgar ambisjónir – og tað er at vera. Tað er nútímans terapi, at vit skulu tora at vera í nærveruni, segði Emily Næs.

## Arbeiðsgleðin

Hon mintist aftur á tíðina, áðrenn strongd bleiv partur av arbeiðskorunum, á arbeiðsgleðina, sum valdaði tá. Og hvussu týdningarmikið tað er at finna tað aftur.

– Eg minnist við gleði og stoltleika aftur á stórslignar løtur, sum námsfrøðingur. Eg minnist fagnaðin, sum var í mai í 92, har allir stovnarnir og barnagarðarnir í landinum luttóku. Evnið var havið og alt tað, sum í tí er, og vit endaðu við einum sokallaðari "lítlari ólavsøku" á Vaglinum. Har treyt ikki hugflog. Har vóru vakrar bukettir av skapanargleði, har var sangur, har vóru búnar, har var upplestur. Eg sjálv stóð í einum stórum posa og við einum longum

horni, tí eg var einhyrningurin í "Einhyrningurin og havið", og vit høvdu lisið hesa bók á tamb fyri børnunum og gjørt búnar til tey, soleiðis at tey skuldu sleppa at vera við í einum stórum hátíðarhaldi oman á Vaglið saman við fleiri hundrað øðrum børnum.

– Tað var so heilt fantastiskt at uppliva, og veðrið var nakað so gott tað summarið og serliga hesar dagarnar. Tað er so fantastiskt sum námsfrøðingur at kunna hava tað at lýta aftur á, og tað harmar meg so nógv, at tað ikki longur er tíð og orka og umstøður at uppliva slíkt so nógv, soleiðis sum støðan er í dag. Tí fólk hava fingið so nógv annað afturat tí at vera námsfrøðingur. Men vit mugu royna at tosa hesi her stóru upplivilsini upp og siga tað, at tað ber til, tað nýtist ikki at vera so stórt. Men tað ber til, segði Emily.

Hon mintist eisini á nógvu, stuttligu legurnar, sum hon enn javnan verður mint á, tá hon møtir sínum nú vaksnu barnagarðsbørnum á gøtuni. Og hon mintist aftur á eina tíð, har tað var rúm fyri at arbeiða eitt sindur eyka av egnum huga uttan at fáa eyka løn fyri tað, og uttan at nakar rykti brýr av tí orsøk.

– Vit fór á legu við teimum stóru børnunum, og vit gleddu okkum sum smábørn at koma avstað. Vit vistu væl, at vit ikki fóru at fáa fulla løn fyri at vera burtur í tvær nætur við børnum, men vit fingu so forferdiliga nógv annað afturfyri. Vit kundu eisini hava okkara egnu børn við á legu, og barnagarðsbørnini upplivdu sum seks ára gomul, beint áðrenn tey fóru í skúla, hvat tað var at vera burtur frá mammu, at vinka farvæl, at vera keddur, at leingjast, at gleða seg at koma heim, at uppliva eina skattajakt, sum var tilrættalagt av vaksnum, sum tímdu at spæla. Altso, ber tað til annað enn frøast um at hava verið við til at upplivað tað?

– Og eg møti børnum í dag, sum koma til mín og siga, minnist tú, tá vit vóru í Húsavík, tað var so stuttligt, vit svumu í klæðum. Og á Selatræ, minnist tú tað, vit skreiddu í ánni í regnklæðum, tað var barasta so stuttligt. Tað er stuttligt, tað er námsfrøði. Tað er, tá vaksin eru glað og tíma at spæla og finna upp á. Og børnini uppliva eina samanrenning, løtur har øll eru saman og deila gleði – gleði um ánna, um vatnið, um maðkarnar, um alt tað, sum livir og grør. Tað er at vera námsfrøðingur, hugleiddi Emily.

## Eisini grenj og grýtulok

Hon viðurkendi, at á hugaferðini aftur í tíðina eru tað øll tey positivu lýsingarorðini, og alt tað fantastiska frá tí tíðini, sum stendur klárast í minninum. Tað vóru tó eisini viðurskifti og umstøður, sum róptu eftir batum og at gera okkurt við tá eins og nú.

– Vit grenjaðu eisini, og vit larmaðu eisini við grýtulokum, og vit vildu hetta og hatta. Tí tað er neyðugt, tá ein er ein felagsskapur arbeiðir sum eitt felag, so vil man hava góð kor, og soleiðis skal tað vera.

– Fyritreytin fyri trivnaði er, at starvsfólk trívast, og at arbeiðsgleðin er til staðar. Tá vit seta okkum námsfrøðilig mál, so er tað týdningarmikið, at tað er møguleiki at sleppa at arbeiða við og fram ímóti málinum og soleiðis økja hugin og orkuna til at geva íkast í henda góða felagsskap, og í arbeiðsplássið, segði Emily Næs.

# Fakfagnaður 2022:

# NÁMSFRØÐIN FYRR OG NÚ

**10. og 11. juni verður fakfagnaður í Norðurlandahúsinum við fjølbroyttum verkstovum og spennandi sofapráti. Í Pedagogfelagnum lata tey væl at áhuganum fyri fakfagnaðinum**

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Fríggjadagin 10. juni og leygardagin 11. juni skipar Føroya Pedagogfelag fyri fakfagnaði í Norðurlandahúsinum, og evnið hesa ferð er “Námsfrøði fyrr og nú”.

Teir berandi aktivitetirnir á fakfagnaðinum eru verkstovurnar, har freistin at tekna til var úti 15. apríl. Úrslitið er ein fjølbroytt skrá við fleiri spennandi verkstovum.

Eisini verða áhugaverd sofaprát, eitt fyrrapart og eitt seinnapart, sum eisini leggja seg upp at evninum fyri fakfagnaðin – “Námsfrøði fyrr og nú”.

Føroya Pedagogfelag vil geva so stórum parti av limaskaranum sum møguligt høvi at vitja fakfagnaðin, og tí er hann skrásettur at vera í tveir dagar. Skráin er nevniliga tann sama hvønn dagin. Einasti munur er, at persónarnir verða skiftir út í sofaprátunum fyrrapart, har gestirnir í sofuni verða fyrrverandi forfólk í Føroya Pedagogfelag. Tann fyrra dagin verða tað Carita Bjørklund og Jarvin Feilberg Hansen og tann seinna dagin Hildur Patursson og Maud Wang Hansen.

Sí annars skránna aðrastaðni her í blaðnum.

Rúm er fyri tilsamans 400 vitjandi á fakfagnaðinum hvønn dagin, og freistin at tekna seg er úti 3. juni. Í Føroya Pedagogfelag lata tey væl at áhuganum og ráða fólki til at skunda sær at tekna seg, um tey vilja tryggja sær atgongd.

Fakfagnaðurin er ókeypis fyri limir í felagnum, og fyri onnur er kostnaðurin 700 krónur.

**Skráin fyri fakfagnaðin er á síðu 39**

# Um tað mundið meðan jørðin enn ikki var rund...

*Elin Henriksen*

Við innganginum til yrkingina *sólareygað* eftir Róa Patursson byrjar filmurin *Sólareygu*, sum lýsir barnagarðslív í Hoyvík í 1989. Nakrir námsfrøðingar í áhugabólkinum *Dagstovnanámsfrøði í Føroyum* hava hugt at filminum, hugleitt og samanborið við støðuna nú, eina triðings øld seinni. Í hesari greinini verður roynt at greiða frá nøkrum av tí, sum orðaskiftið snýr seg um.

**sólareygað**

kenna dagin sum hann er
eiga heimin uttan orð

tá onki trýstir
rørslurnar eru sjálvsagdar
og myndirnar glærar

og tú rør
gjøgnum stilli
damlar inn í sólina
gjøgnum spegilsandlit
gjøgnum gloymsku
og einsýnda kvirru

## Tíðin

*"Um tað mundið meðan jørðin enn ikki var rund"* eru fyrstu orðini í bókini *Tornið á heimsins enda* eftir William Heinesen, sum seinni heldur fram: *"Men hetta veitst tú ikki enn, tí tú ert púra ókunnigur í orðaheiminum og noyðist fyri fyrst at hjálpast sum frægast við ljóðum og myndum."*

At *"eiga heimin uttan orð"*. Tað, sum børnini gera, tá ið tey byrja í dagstovni. Tá ið tey uppliva heimin uttan um seg við ljóðum og myndum, og tíðin ikki enn hevur fingið skap. Tíðin er her og nú, og orðini røkka ikki til at geva nakra fatan av henni. Dagurin hevur byrjan og enda, men barnið veit ikki altíð, hvat er hvat. Og árið er óendaligt. Tað eru tær føstu, endurtiknu hendingarnar og gerðirnar, sum so við og við gerast beinagrindin hjá tíðini og hjálpa børnunum at finna seg til rættis í henni. Dagsrytman, vikurytman og ársrytman. Rutinan.

---

Eitt, sum nógv leggja til merkis í filminum *Sólareygu* er, hvussu góðar stundir starvsfólkini geva sær. Ein friður og ró yvir degnum. Stundir til nærveru og at hugdýpa seg saman við børnunum um upplivingarnar.

Fert tú at rokna tímar í mun til barnatal, so er tað ikki, tí at normeringin var betri tá. Færri børn og




*Børn úr dagstovninum Lítlafløtti á Strondum eru komin á rættina á heystfjall*

*Mynd: Elin Henriksen*

færri starvsfólk í hvørjari stovu. Til dagstovnin hoyrdu køkshjálp og húsavørður; og føstu, mánaðarligu fundirnir lógu uttan fyri arbeiðstíð – umframt tvey vikuskifti um árið til ráðlegging og samveru.

Men tað, sum kanska serliga ger mun í gerandisdegnum, er, at minst tvey starvsfólk í hvørjari stovu arbeiða 40 tíma viku, og at lítil útskifting er av starvsfólki. Rættiliga langt frá støðuni, sum hon nógvastaðni er nú á døgum.

Tað tekur drúgva tíð, í minsta lagi eitt heilt ár, at liva seg inn í mentanina á einum dagstovni: mannagongdir, námsfrøðina, umstøður inni og úti. Men við stórari útskifting av starvsfólki og nógvari niðursettari tíð er torført at skipa virksemið nóg kontinuerligt til, at barnið fær tryggleikan av at kenna seg aftur í tí, sum fer fram gjøgnum dagin, vikuna og árið.

## Umsorgan

Hugtakið *umsorgan* er neyvan tað, ið hevur fylt mest í námsfrøðiligum kjaki seinastu áratíggjuni. Tað verður heldur ikki beinleiðis nevnt í filminum *Sólareygu*, men liggur heldur sum grundvøllur undir námsfrøðini og kemur til sjóndar í relatiónunum millum børn og starvsfólk.

Allir námsfrøðingar vita, hvussu stóran týdning tað hevur at síggja og virða tað einstaka barnið, og at geva tí hóskandi avbjóðingar. Stuðla teimum í at tora eitt sindur meira, og verja tey, tá ið dirvið vantar. Læra tey at hjálpa hvørjum øðrum og at gerast sjálvbjargin. Skapa umstøður, sum geva teimum møguleika bæði at kenna seg sum part av bólkinum og at kunna vera fyri seg sjálvi.

Ein fortreyt fyri hesum er, at námsfrøðingurin kann eygleiða barnið í longri tíð, kann læra tað at kenna, og eisini kennir foreldrini og heimligu viðurskiftini. Nakað, sum stórur dentur varð lagdur á tá; og spurningurin er, hvussu væl tað liggur fyri nú á døgum. Røkkur tíðin til, støðast starvsfólkini nóg leingi, hvussu nógv starvsfólk eru um hvørt barnið? Eitt annað er, at heimligu viðurskiftini hjá børnunum uttan iva eru ymiskari nú. Samfelagið sum heild er fjølbroyttari og samstundis meira individualiserað; og hjá summum børnum kann vera torført at halda skil á fløktum familjusamansetingum.

Krøvini, sum fylgja við tí at møta einstaka barninum og einstøku foreldrunum, eru vorðin alsamt størri, samstundis sum tíðin til tað er minkað. Eitt, sum hugtekur við filminum *Sólareygu*, eru løturnar við friði og nærveru um morgunin við foreldrum, millum børnini og millum starvsfólk og børn. *"Sovorðnar løtur finnast enn, men eg eri bangin fyri, at tær eru alt ov fáar,"* sigur ein nútíðar námsfrøðingur.

## Karmar fyri spæli

Spæl er sjálvt lívið hjá børnum á dagstovni. Spyrt tú barnið, hvat tað hevur gjørt í dag, og svarið er "einki" - so merkir tað, at barnið hevur verið púra burtur í spælinum, sigur ein námsfrøðingur í filminum *Sólareyga.* Har síggjast eisini góðir karmar fyri spæli og fjølbroyttum virksemi, um enn vit fáa at vita, at heldur trongligt er í stovunum. Inni eru einføld og ikki ov nógv leiku, og í gongunum er pláss til, at børnini kunnu vera fyri seg sjálvi. Úti eru fjølbroyttir møguleikar við mold og sandi, eldi og vatni, at renna og klintrast - og pláss at koyra við mánabili. Stutt er niðan í hagan, og vit fylgja eisini við einum bólki av stórum børnum, sum fer til gongu oman á Boðanes at fanga kombikk og spæla á klettunum í fjøruni. Myndir, sum birta tankar um, hvønn leiklut náttúran og virksemi í henni hava fyri føroyska dagstovnanámsfrøði.

Nú á døgum høvdu børnini mestur verið latin í bjargingarvestar, tá ið tey fara í fjøruna, har tað ikki er heilt grunt. Hinvegin sást týðiliga í filmunum, at dentur verður lagdur á, at børnini sleppa at royna seg í náttúruni, klúgva upp á klettar, spæla í hyljum og ganga langt. Avbjóðingar, sum styrkja og menna børnini á mangan hátt, og sum samstundis leggja grundarlag undir ansi fyri náttúruni.

Tað týdningarmesta er tó - sum altíð - hugburðurin hjá starvsfólkinum: *"man má hava hug til, sum vaksin, at blíva barn sjálvur,"* og *"alt er spennandi hjá einum vaksnum, at vera saman við børnunum - samtíðis sum tú hevur yvirblikk"*, sum námsfrøðingurin í filminum tekur til.



*Ein várdagur á dagstovninum við Stórheygg í Hósvík.*

*Mynd: Jóna Guttesen*

Kynstrið er *samstundis* at eygleiða og taka neyðug stig *og* at fylgja við børnunum inn í spælið og vera partur av tí.

## Virksemi sum arbeiði

Børn í barnagarðsaldri halda tað ofta vera spennandi at taka lut í arbeiðinum hjá teimum vaksnu. Ella ið hvussu er hyggja at. Starvsfólkini eru fyrimyndir hjá børnunum í øllum, sum tey takast við. Í filminum *Sólareygu* síggja vit børnini baka eina kaku, sjálvi, við hjálp og leiðbeining frá námsfrøðinginum. Børnini síggja eisini, at klæði verða vaskað og hongd á snórin. Í frásøgnum úr gomlum døgum um barnaspæl verður ferð eftir ferð nevnt, hvussu børnini spældu mangt og hvat við arbeiðinum hjá vaksnum sum fyrimynd. Henda møguleika tóku námsfrøðingarnir við inn á dagstovnin sum tilvitaðan part av virkseminum.

## 2022 – og hvat so?

Í orðaskiftinum um samanberingina millum 1989 og 2022 sigur ein námsfrøðingur um dagstovnin í filminum *Sólareyga*, at har er: *"ein stabilur starvsfólkahópur. Hetta fær meg at hugsa um, hvussu dagstovnaøkið sær út í dag, har tað er torført at manna stovnarnar. Vónandi koma vit har til, at tað at arbeiða sum námsfrøðingur á stovni, er eitt ynskistarv fyri mong".*

At menna føroyska dagstovnanámsfrøði er eitt týðandi stig á teirri leiðini.

**Heimildir:**

Filmurin *Sólareygu* (1989)
vimeo.com/79292257

Rói Patursson:
Líkasum (1985), bls. 61

William Heinesen: Tornið á heimsins enda (Týðing: Hans Thomsen)

Marius Johannesen: Føroysk Barnaspøl (1979), bls. 9-16

# Námsfrøðin fyrr og nú?

## 10. og 11. juni í Norðurlandahúsinum

**SKRÁ:**

| | |
|---|---|
| 09.00 – 09.15 | **Vælkomin** |
| 09.15 – 10.15 | **Forfólkini tala**, Sofaprát við fyrrverandi forfólk<br>Fríggjadagin 10. juni - Carita Bjørklund og Jarvin F. Hansen.<br>Leygardagin 11. juni - Hildur Patursson og Maud W. Hansen.<br>Uni Arge leiðir samrøðuna |
| 10.30 - Verkstovurnar: | **“Kann eg gera tað eg vil?”, Tað skapandi barnið,** Elin N. W. Tausen<br>**Verkhúsið Virkni,** Óluvá Mcloud Venned |
| 11.15 – Verkstovurnar: | **Hvat eru professionellar námsfrøðiligar relatiónir, og eru serligar treytir fyri hesum í Føroyum?** Gunnvá Edvardsdóttir<br>**Heimaráðgevingin í Almannaverkinum,** Anja Djurhuus |
| 12.00 – 13.00 | **Matarstegður** |
| 13.00 – 14.00 | **Millum fortíð og framtíð,** Sofaprát við námsfrøðingar um, hvussu námsfrøðin hevur flutt seg. Í sofuni: Julianna Næs, Edda Hjartvardsdóttir, Ragnhild Dahl, Maibritt Simonsen og Jórun Niclasen.<br>Ingolf S. Olsen leiðir samrøðuna |
| 14.15 – Verkstovurnar: | **Rørslu- og barnagarðslívið,** Tórunn Danjalsdóttir og Alice Rosen<br>**Skúlanámsfrøði,** Harry Knudsen, |
| 15.00 – Verkstovurnar: | **Frítíðarskúlalív – samskapandi samstarv,** Beinta Klakkstein,<br>**Bústovnanámsfrøði,** Teitur Jóannesarson |
| 15.45 – 16.00 | **Farvæl** |
| | **Liðugt** |

*Rúm er fyri 400 fólkum.



# Eftirløn

Til eitt langt virkið lív, eftir at farið er av arbeiðsmarknaðinum, er gott við eini persónligari uppsparing.

**Lat okkum hjálpa tær at seta saman títt fíggjarliga trygdarnet.**

liv.fo